VIÐMERKINGAR

# Ræðuligt einsemi

## 2. partur

**Hans Birgir Hansen**



Tá ein ikki orkar at vera innisperraður, so verður ein við magt lagdur í spennitroyggjuna, og sálarlækni og pleygarar, sjúkrasystrar, skæða síðani klæðini av einum, tá ein verður fæsthildin á hond og fót, og fær eina sproytu, ein upplivdi »sjokk viðgerð« og í ávísum førum, tá ið sproytan ikki ger ætlaðu ávirkan á heilan, og sentralu nervaskipanina, so fær ein »sjokk viðgerð«. Ein hevur sæð teir geva einstøkum, aftaná at teir vóru doyvdir, niðri og heima, ið eingin ger sær far um í tí dagliga. Tá ið sjúklingarnir verða doyvdir, verða elektriskar strálur sendar inn í heilan fyri at niðurbróta tær sentralu nervaskipanir, ið ger, at hesi kenna seg forfylgd, og hvat hesi hava upplivað, verður brent burtur. Og tá ið hesi vakna aftur, minnast tey einki til alt, ið tey upplivdu í lívinum, og hvat tey framdu av tí kriminella, so har er ikki nógv eftir slíka »skjokk viðgerð«, ein hevur upplivað sálarlækni gav einstøkum niðri og heima. Og um sproytuna kann ein siga, tá ið hon byrjar at virka uppá heilan og sentralu nervaskipanina, gerst alt óklárt fyri eygunum, síðan slær pulsurin kvikliga, so merkir ein stórar kraftigar sittringar, út og inn gjøgnum heilan og sentralu nervaskipanina. Tað er slíkt, ið fær fólk ørð í høvdinum, og fær mong at skrála og rópa av tí trýstinum, sproytan frá sálarlækna gevur teimum, ið missa tamarhaldi á sær sjálvum. »Avdúking« Soleingi havi eg borið hetta loyndarmál, at tað er ein himmalsins lætti at fáa avdúka slíkt, ið gongur fyri seg niðri og heima á Statssjúkrahúsum, á stovnum og hvørs starvsfólk gera sínar royndir við heilivági. Slíka mannalagnu hevur ein upplivað, sum omanfyri nevnt, tí ein ikki tillagaði seg nóg skjótt til umhvørvi á fimleika og ítróttarskúlum í Danmark og av øðrum grundum og heima í Føroyum, ið er ein ræðulig mannalagna. Tað, sum bjargaði mær úr slíkum var, at ein kláraði at liggja undir likam og sálarliga trýstinum, og at hava tamarhald á sær sjálvum, so ein ikki leyp framav í slíkum umhvørvum, niðri og heima. Tað eru nógvar slíkar mannalagnur um alt landi, eg havi samhuga við, ið rakt eru av sorg, ið ikki eru so væl fyri til likam og sálar, ið tørva at koma út millum onnur menniskju, ið hava upplivað slíkar mannalagnur. Tað er mín vón, at lesarar hava fingið forstáðilsi fyri slíkum, ið ikki er fallið í góða jørð hjá teimum, ið eru upprunin til slíkar mannalagnur um landi, ið er livibreyði hjá øllum, ið taka sær av teimum. Tað eru mong, ið hava framt sjálvmorð, ið upplivdu slíkt av sproytd um niðri og heima fryst í 70 árunum, og hava framt slíkt síðani, ið ongin ídag vil kennast við, minst av øllum tey, ið fingu hesi tvangsinnløgd/innisperraði. Tað finnast aðrir betri viðgerðarhættir enn sjokkviðgerð og sproytur og tablettir, sum dagliga verður givið teimum, ið skulu vera offur hjá heilivágs ídnaðinum í nógv umrøddu arvagransking í Føroyum. Tað hevði verið gott, um øll vóru við til at veita øllum teimum, ið verða órættvíst viðfarin moralskan stuðul, so at tey sterku ikki framhaldandi sóla sær í slíkum mannalagnum, øll tey ein stríddist við í meira enn 30 ár.

# Um bankasakin rættvísger fullveldið og útspillingina av ríkisfelagsskapinum – hví er so neyðugt at pella um veruleikan?

**Regin Eikhólm**



Nógv er sagt og skriva um donsku kreppuhjálpina við hartilhoyrandi partabrævabýtið í mars 1993, sum skuldi javnstilla táverandi Føroya Banka og Sjóvinnubankan. Men hvat var tað sum hendi, tá Føroyar í oktober 1992 fíggjarliga fóru á húsagang og qua ríkisfelagsskapin bóðu Danmark um hjálp og fingu hana.

**Færøerne i bankkrisens tegn**

Henda spurningin hevur Richard Mikkelsen sett sær fyri at útgreina í nýliga útkomnu bókini: "Færøerne i bankkrisens tegn" 2001. Richard Mikkelsen er fyrrverandi nationalbankastjóri, og var formaður fyri Finansieringsfonden af 1992, sum skuldi umsita peningin, ið Landsstýri noyddist at læna frá Danska Statinum.

Bókin nemur stutt tað politiska- og mentunarliga stevið, sum søguliga undan er farið. Restin av teimum 300 síðunum í bókini er ein neyv og náðgreinilig gjøgnumgongd av fíggjarligu endureisingini av føroyska fíggjarheiminum við hópin av ávísingum. Richard Mikkelsen vísir við bókini eitt yvirordnað innlit og ein neyvleika til føroysk viðurskifti, sum flestu føroyingur av røttum kunnu øvunda honum men eisini læra av. Annars hevur Rolf Guttesen eitt virðiligt ummæli av bókini í Dimmalætting 9. og 19. februar 2002.

Bókin gevur okkum nakað at hugsa um, bæði reint professionelt og moralskt. Tað verður argumenterað sakliga, grundgivið við ávísingum, og bankamálið verður lýst út í æsir.

Onkur hevur samanborið føroysku fíggjarkreppuna við eitt hjartastopp, har danir, eftir áheitan góva hjartamassagu, men undir viðgerðini brotnaði eitt rivjabein, og øði spann í føroyingar. Patienturin, føroyski fíggjarheimurin, kom tó skjótt fyri seg, og er í dag sterkari enn áður, enntá við einum fusioneraðum banka sum longu hevur vorpið gullegg.

Gráa tøkkin danir fingu fyri hjálpina, var ein stevning fyri at hava brotið eitt riv á einum óhjálpnum patienti. Milliarda "kompensatiónin", sum stevningin gav okkum, fekk ongan føroying at rodna - hvussu kann tá nakar okkara fáa samvitskubit av blokkinum?

**Bankamálið**

Partabrævabýtið í mars 1993 setti gongd í ein hóp av illgitingum, og ikki minst í Sjónvarpi Føroya við Høgni Hoydal á odda. Um hesa sending skrivar Richard Mikkelsen: "Udsendelsen gav sig ud for at være et dokumentarprogram, men havde helt klart karakter af en smædekampagne mod danske politikere og myndigheder, Den Danske Bank og Finansieringsfonden" (s.147). Hetta eru sterk orð frá einum manni, sum annars hevur eitt varligt orðalag í bókini. Sjónvarpssendingin var tendensiøst gitandi við eftirgjørdum myndum, har danir vóru skurkarnir. Men føroyingar sjálvir høvdu ábyrgdina av kreppuni, og høvdu sjálvir biðið danir um hjálp, sum danir treyðugt søgdu ja til (s.8 R.M.).

Men taktikkurin hjá Høgna Hoydal loysti seg væl politiskt, ella sum R.M. sigur tað:"Udsendelsens leder, programmedarbejder Høgni Hoydal, fik efterfølgende en hurtig karriere i færøsk politik som repræsetant for Det replublikanske Parti" (s.148).

**Fullveldisherðferðin**

Tær sokallaðu "dokumentarsendingarnar" hjá Høgna Hoydal løgdu lunnar undir fullveldisherðferðina og legaliseraðu illgitingar um donsku kreppuhjálpina, ríkisfelagsskapin, og annars alt sum danskt var. Sjálvt okkara fíggjarmálaráðharri stóð fyri stuttum á Løgtingsins røðarapalli og pellaði um, at danir høvdu ríka seg upp við at lána okkum kreppupening til okursrentu. Smb. ríkisumboðnum var einki hald í hesum pástandi.

Sami Karstin Hansen kundi á vitjan í Íslandi upplýsa, at 85% av føroyingum ynskja loysing frá Danmark (Morgunblaðið 16/1-2002), vælvitandi at fólkaatkvøðan 26. maj 2001 bleiv avlýst, tí undirtøkan fyri loysing var væl undir 50%. Kanska hevur hann fiktiva talið frá varaløgmanni, sum í sínum danska kunningarbóklingi "Myten om rigsfællesskabet", sigur, at "Dog viser alle meningsmålinger, at 75% af vælgerne ønsker et selvstændigt Færøerne …" (s. 103),. Íslendski leisturin til fullveldið í 1944 setti nevniliga 75% sum minstamark fyri undirtøku, um fullveldið skuldi gerast veruleiki, og tá ljóða 85% meiri sannførandi enn minstamarkið 75%. Íslendsku brøðrurnir skuldu helst ikki ivast í vilja Føroya fólks, sjálvt um neyðugt var at pella eitt sindur!

Annars vísir seinastu meiningarkanning hjá Fynd (mars 2002), at 59% av teimum spurdu ynskja at Føroyar menna seg innan fyri ríkisfelagsskapin, meðan bert 29% ynskja eina menning uttan fyri ríkisfelagsskapin.

**Loysingarprojektið við 3 milliarda undirskoti**

Kendi danski blaðmaðurin og politikarin Viggo Hørup segði, at " Menneskenes handlinger, også de politiske, skal udspringe af respekt for kendsgerningerne. Ellers fører de til vrøvl og ulykker" (s.17. R.M.).

Fullveldisutopi varaløgmans er eitt gevandi dømi um vantandi respekt fyri veruleikanum. Eftir liggja 10 tals millióna rovini av selektivu fullveldis Hvítubók, fullveldis grundlóg, umframt tað í Føroya fólk ísádda sundurspjaðingarlindið, sum fylgir í kjalarvørrinum á fullveldisprojektinum.

Fullveldisfólk halda uppá, at Landskassin seinastu fýra árini hevur havt um 2 milliardir í yvirskoti, men faktum er eitt undirskot uppá 3 milliardir, sum danir hava goldið. Blokkstuðulin í sama tíðarskeiði var 4 milliardir umframt at Føroya Banki seinastu fýra árini hevur vorpið gullegg (1 milliard). Altso uttan blokkstuðulin og gulleggið hjá bankanum hevði Landskassin hesi seinastu fýra árini havt 3 milliardir í undirskoti.

Sitandi loysingarsamgonga hevur verið heppin og notið gott av eini tíð við hákonjunkturi, saneraðum vinnilívstólum og einum fusioneraðum sera gevandi almennum banka, takkað veri átakinum hjá Finansieringsfonden af 1992, sum Richard Mikkelsen var formaður fyri. Tríggjar milliardi í undirskoti í góðum tíðum við fullum blokki! Hvussu verður nú tað sansar at í bæði borð, minni kvotur, lægri prísir og uttan fyrilit skerdum blokki?

**Sjónvarp Føroya og trúvirði**

Bókin hjá Richard Mikkelsen "Færøerne i bankkrisens tegn" hevur eitt dokumenterað trúvirði, meðan bóklingurin hjá varaløgmanni "Myten om rigsfællesskabet", ikki hevur nakað dokumenterað trúvirði, men er meira í tráð við bókarøðina: "Við abba á flot", ella "Við ommu til neytar", so ein beinleiðis samanbering gevur onga meining. Hinvegin kundu vit samanborið "dokumentarsendingina" hjá varaløgmanni við bókina hjá Richard Mikkelsen og mett um trúvirði.

Taka vit undir við Søren Kierkegaard, tá hann sigur, at: "Livet forstås baglæns, men må leves forlæns", so er nú so nógv nýtt komið fram um "bankamálið", at almenna Sjónvarp Føroya moralskt eigur at taka táttin upp um oman fyri nevndu "dokumentarsending" hjá Høgna Hoydal, og seta hana inn í samanhangin, sum vit kenna hann í dag. Gera vit einki, verður hon standandi sum ein skamplettur, sum ið alt ov stóran mun legaliseraði ósannindi ella lygnir um ríkisfelagsskapin og donsku kreppuhjálpina í 90-árinum, og tað kann hvørgin parturin hava sitandi á sær.

Støðan verður ikki greiðari av, at vit ístaðin fyri varaløgmann hava sent ein vrakaðan landsstýrismann til at umboða okkum á danatingi. Gamalt var annars ikki at útflyta vrakfiskin!

Tá viðkvæmir spurningurin um ríkisfelagskapin ella loysing stinga seg upp, eigur almenna Sjónvarp Føroya ikki at lata seg misbrúka!



VIÐMERKINGAR

# Sjálvandi kunnu vit fáa ein sjálvberandi búskap!

**Magni Laksáfoss**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Ongin ivi er um at føroyski búskapurin kann gerast sjálvberandi, sjálvandi kann hann tað. Vit skulu bara bera okkum rætt at, soleiðis at vit, samstundis sum vit gera búskapin sjálvberandi, eisini tryggja okkum eina javna búskapargongd og eitt sterkt vinnulív. Fráfarandi landsstýri hevur borið seg sera skeivt at. Í greinini verður víst hvussu tað eigur at verða gjørt.

Føroya fólk og allir flokkar á tingi eru samd um, at nú er tíðin komin har arbeiðast skal ímóti at fáa ein sjálvberandi føroyskan búskap. Tað er eitt ódnartak at fáa búskapin sjálvberandi, tí livikorini í Føroyum eru so nær tengd at ríkisveitingini. Ríkisveitingin er vorðin ein partur av búskapinum, og tí er arbeiði móti at fáa ein sjálvberandi búskap í veruleikanum eitt arbeiði móti at gera okkum óheft av ríkisveitingini. Hetta er sjálvsagt eingin løtt uppgáva, men eitt stórt arbeiði har allar kreftir mugu savnast um at finna loysnirnar, so vit kunnu vera ríkisveitingina fyri uttan.

**Semja um málið, men ikki um mannagongdina**

Man kann siga, at fólk eru samd um málið, men ikki um mannagongdina. "Neyð lærir nakna kvinnu at spinna!" siga nakrir - "hon nýtist ikki at vera nakin fyri at læra at spinna!" siga aðrir.

Fyri so vítt hava báðir partar rætt!

Uttan at seta okkum málið, og stremba móti málinum, kunnu vit ikki røkka tí. Til tess er málið alt ov langt burtur. Vit eru noydd til at spenna okkum út, stremba, skera ein part av yvirflóðini burtur, so vit læra at liva fyri minni. Samstundis eru vit eisini noydd til at viðurkenna, at vit liva í einum vælferðarsamfelagið, og vit ætla at okkara samfelag eisini skal vera eitt vælferðarsamfelag eftir at vit hava fingið búskapin sjálvberandi. Man kann siga, at kvinnan skal læra at spinna lætt kløðd - ikki nakin!

**Niðurskurðurin í blokkinum**

Tað hevur verið nógv kjak um niðurskurðin í blokkinum. Tað verður alt ov nógv tosað um niðurskurðin. Vit vistu øll at blokkurin skuldi minkast, tað var jú tað fráfarandi landsstýri setti sær fyri tá tað tók yvir. Eingin grund er til at spilla orku uppá at kjakast alt ov nógv um tað.

Tað sum veruliga hevur týdning í hasum samanhanginum, er ikki hvat fráfarandi landsstýri hevur gjørt, men hvussu tað gjørdi tað og hvat tað ikki hevur gjørt. Fyrst og fremmst kannst tú ikki skerja blokkin í síðstu løtu áðrenn tú sleppur róðrinum, bert fyri at lata næsta landsstýri sita við rokningini. Ei heldur kannst tú fremja so stórar skerjingar í einum, tú mást taka tað í minni bitum, soleiðis at tú við vissu kannst siga at "nú klára vit okkum fyri uttan hatta, lat okkum nú taka næsta stigið". Hatta er, í mínum eygum, tað sum fráfarandi landsstýri veruliga gjørdi galið!

Nógv størri týdning hevur hvat fráfarandi landsstýri ikki gjørdi!

Um búskapurin skal gerast sjálvberandi, so vit kunnu vera ríkisveitingina fyri uttan, uttan at vit skulu alt ov langt niður í livikorum, so má arbeiðast fyri at okkurt annað kemur í staðin fyri ríkisveitingina. Um einki kemur í staðin, so má arbeiðast fyri at vit kunnu læra at klára okkum fyri minni, altso sparingar.

Her hevur fráfarandi landsstýri gjørt alt ov líti. Trúgvin uppá at "neyð lærir nakna kvinnu at spinna" sær út til at hava drivið verkið, men samstundis hava teir tryggja sær, at hon ikki skal vera nakin í teirra tíð, men fyrst tá næsta landsstýrið er komið til.

Tað verðurført framm, at stór avlop hava verið á landskassanum. Gaman í. Men tað var eisini ein mergja hákonjunkturur. Aldrin áður hava Føroyar uppliva nakra líknandi framgongd í fiskanøgd og fiskaprísi. Fyri ikki at tala um afturberingarnar av avsetingunum hjá Føroya Banka.

Nei. Ikki kann sigast at landsstýrið hevur gjørt nokk fyri at gera búskapin kláran til eina minking í ríkisveitingini.

**Hvat skal til?**

Tá ein inntøka fellur burtur, má onnur koma í staðin. So einfalt er tað. Um vit ikki megna at fáa aðra inntøku í staðin, mugu vit læra at liva fyri minni og harvið lækkað livikorini í Føroyum. Flestu av okkum vilja gjarna liva í Føroyum við lægri livikorum, um vit samstundis fáa ein sjálvberandi búskap. Men samstundis er tað eingin loyna, at um livikorini í Føroyum gerast nógv lægri enn í grannalondunum, mugu vit síggja tað vælútbúnað fólkið finna sær betri lønt størv í grannalondunum, og tá gerst enn verri at arbeiða fyri størri inntøkum í Føroyum.

Tískil er bert ein gongd leið: Vit mugu miðvíst arbeiða móti at skapa størri inntøkur í Føroyum, samstundis sum vit minka um ríkisveitingina.

Tá vit hava sæð tað, er eisini lætt at síggja, at fráfarandi landsstýrið hevur fokuserað alt og einvíst eftir niðurskurðinum í ríkisveitingini. Tað nyttar ikki at minka um ríkisveitingina um tú einki hevur gjørt fyri at skapa aðrar inntøkur sum kunnu koma í staðin.

Tískil fellur tað komandi landsstýri í lut, at finna loysnirnar uppá hvussu inntøkurnar í Føroyum kunnu økjast. Hetta er eingin løtt uppgáva, og krevur tað ein innsats á nógvum ymiskum økjum í senn. Samstundis verður tað eisini luturin hjá komandi landsstýri at finna loysnirnar uppá hvussu vit kunnu liva fyri minni - og samstundis liva væl.

Tað sigur seg sjálvt, at ein uppgáva av hesum slag krevur eina ætlan. Av tí at uppgávan er sera umfatandi, og kemur at raka allar partar av vinnulívinum, umsitingini, skúlunum, almannaverkininum, ja stórt sæð út í hvønn krók í Føroyum, so krevst ein heildarætlan.

**Heildarætlanin**

Heildarætlanin skal vísa á hvussu ymsu partarnir av samfelagnum skulu skipast fyri at skapa ein sjálvberandi búskap. Vit eru noydd at umskipa samfelagið um búskapurin skal gerast sjálvberandi.

Eitt gott dømi er skúlaverkið. Hvar eru fiskivinnuskúlarnir? Vit hava bert ein lítlan fiskivinnuskúla - eru vit ikki ein fiskivinnutjóð? Um vit framhaldandi skulu vera frammarlaga innanfyri fiskivinnuna, er neyðugt at vitan alla tíðina verður førd til vinnuna. Hetta kunnu vit m.a. tryggja okkum gjøgnum fiskivinnuskúlar.

Heildarætlanin skal eisini taka hædd fyri øllum teimum viðurskiftum, sum vit vita koma at ávirka búskapin, og teimum viðurskiftum, sum vit rokna við koma at ávirka búskapin. T.d. vita vit, at fiskaprísir og fiskanøgd eru svingandi. Her skal heildarætlanin geva sítt boð uppá hvussu politikkurin skal leggjast til rættis, soleiðis at samfelagið í minnst møguligan mun verður skatt av broytingum í fiskiskapi og fiskaprísum. Eisini rokna vit við, at olja verður funnin við Føroyar, her skal heildarætlanin leggja til rættis, hvussu vit taka hædd fyri at Føroyar møguliga gerast eitt oljuland.

Sostatt skal heildarætlanin ikki bert taka hædd fyri niðurskurðinum av ríkisveitingini, men fyri eini røð av ymiskum viðurskiftum sum hava við búskapin at gera, tí øll hesi viðurskiftini eru avgerandi fyri, at vit innrætta ein sjálvberandi búskap rætt.

**Trygdarnetið**

Ein sera týdningarmikil eginleiki við ríkisveitingini, sum ikki hevur verið nokk umrøddur, er eginleikin sum trygdarnet. Ríkisveitingin tryggjar okkum, at vit altíð hava eina fasta inntøku. Um so alt annað fellur burtur, so er ríkisveitingin har. Hetta trygdarnetið vilja vit nú av við, tí vit skulu hava ein sjálvberandi búskap. Aftur her er neyðugt, at heildarætlanin stingur út í kortið hvussu vit ætla at skapa okkara egna trygdarnet. Vit kunnu ikki liva í einum so skiftandi vinnulívi, sum fiskiskapur er, uttan at hava eitt gott og sterkt trygdarnet. Hetta hevur fiskivinnan eisini brúk fyri.

Nakað av kjaki hevur verið um trygdarnet. Uppsparingin í Landsbankanum er eitt gott stig á vegnum. Búskapargrunnurin er eisini eitt týdningarmikið stig á vegnum. Men enn er avgjørt ikki rokkið á mál. Heildarætlanin skal vísa hvussu stórt trygdarnetið skal vera, og hvussu tað skal skipast, so vit skapa neyðuga tryggleikan í búskapinum.

Tað nyttar ikki at vit hava ein búskap sum vit ikki trúgva uppá, og sum útlendingar ikki trúgva uppá, bert tí vit einki trygdarnet hava.

**Íløgurnar**

Ríkisveitingin verður stundum kalla fyri ein sovipúta, tí vit fáa eina inntøku fyri einki. Hetta er lutvíst rætt, men samstundis hevur ríkisveitingin verið við til at bygt samfelagið nógv skjótari upp enn vit kundu havt gjørt uttan ríkisveitingina. Ríkisveitingin hevur eisini gjørt tað møguligt at gjørt nakrar skeivar íløgur, sum ikki áttu at verið gjørdar, uttan at vit fóru av knóranum fyri tann skuld. Í einum sjálvberandi búskapi er nógv minni rúm fyri íløgum, og als einki rúm fyri skeivum íløgum. Búskapurin má stýrast nógv betur enn áður. Hetta setur enn størri krøv til at heildarætlanin tekur hædd fyri at íløgurnar eru rættar, verða gjørdar í rættari tíð og at allar íløgurnar ikki verða gjørdar í senn.

Heildarætlanin skal tískil raðfesta íløgurnar, so vit vita hvørjar íløgur skulu gerast rímiliga langa tíð framyvir. Hetta skapar stabilitet og minkar um konjunkturútsvingini. Vit mugu burtur frá hovsaloysnum og yvir til væl tilrættalagdar loysnir, har vit hava eina ætlan fyri hvat vit vilja og nær vit vilja tað.

**Vitan er neyðug**

Hvítabók, Caragata-álitið og aðrar frágreiðingar hava greitt frá hvussu ein sjálvberandi búskapur kann skipast. Slíkar kanningar eru gull verdar fyri politikkarnar, tí tær geva tað vitanina sum skal til fyri at avgerðirnar ikki verða tiknar í blindi.

Tað kann væl vera at vit kunnu vinna nakrar sigrar við at seta kikaran fyri blinda eygað, eins og Nelson lordur, men tað er nú einaferð betur og tryggari um vit vita hvat vit gera og hví vit gera tað.

Heildarætlanin skal byggja á kanningar og vitan. Ikki einans kanningar sum eru gjørdar, men kanningar og størri vitan skulu vera ein partur av sjálvari heildarætlanini. Heildarætlanin og stór vitan um samfelagið skulu ganga hond í hond, soleiðis at vit altíð vita hvat vit gera og altíð hyggja at hvat vit gjørdu rætt og hvat vit gjørdu skeivt. Á henda hátt kunnu vit læra av okkara feilum og tryggja okkum at vit ikki endurtaka teir. Uttan eina støðugt størri vitan um samfelagið og tær avbjóðingar okkara samfelag kemur út fyri, kunnu vit ikki stýra rætt og trygt.

**Ein rammuavtala**

Heildarætlanin skal skipast sum ein rammuavtala. Tvs. at flokkarnir semjast um málið fyri búskapin, nevniliga ein sjálvberandi búskap, og um hvussu hetta skal fremjast í verki í stórum trekkum. Tað vil sjálvsagt vera latið upp til tað einstøku samgonguna um at føra búskaparpolitikkin í sínum valskeiði, men semja skal vera millum flokkarnar um, at búskaparpolitikkurin skal haldast innanfyri karmarnar í heildarætlanini.

Flokkarnir eru longu samdir um málið, lat okkum nú semjast um mannagongdina. Ein heildarætlan vil skapa tryggleika og kontinuitet. Nakað sum er heilt avgerandi fyri at fólkið kann samlast um ein sjálvberandi búskap.

Lat okkum saman byggja land!

